# Umsókn um læruplássgóðkenning

| | |
|---|---|
| Yrki og sergrein | **Sølufólk** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navn á fyritøku | | | |
| Bústaður | | Telefon | |
| V-tal | | T-postur | |

| | |
|---|---|
| Umsóknin fevnir um deild | |
| Dagligur leiðari | |
| Ábyrgdari av verkligu læruni hjá lærlingum | |
| Hevur virkið fleiri arbeiðsstaðir? | |

| | |
|---|---|
| Tal av starvsfólkum | |
| Yrkislærd í føstum fulltíðarstarvi sum sølufólk | |
| Útlærd sølufólk við meiri enn 3 ára starvsroyndum | |
| Hevur fyritøkan áður havt læruplássgóðkenning | |

***Gev gætur:***
*1. Skrásetingarprógv fyri skráseting í vinnuskránni skal leggjast við umsóknini*
*2. Læru- ella sveinabræv hjá ábyrgdara av verkligu læruni hjá lærlingum skal leggjast við. Er eingin í føstum fulltíðarstarvi við hesi útbúgvingini, skal virkið gera viðmerking um hetta niðanfyri*.

| Stutt lýsing av virkseminum hjá fyritøkuni, og tær vørur og tænastur sum fyritøkan veitir. Umframt, møguligar aðrar viðkomandi upplýsingar í samband við umsókn um læruplássgóðkenning. |
|---|
| |

**Uppgávur, lærlingurin kemur at takast við**

Fyri at virkið kann góðkennast sum lærupláss til sølufólk, er neyðugt, at lærlingur arbeiðir við niðanfyristandandi virksemi.

Vinaliga fyll út  yvirlitið niðanfyri, hvussu ofta fyritøkan arbeiðir við einstøku uppgávunum.

- Hugtakið "Javnan" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum eru rutina hjá fyritøkuni
- Hugtakið "Sjáldan" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum verða gjørdar av fyritøkuni, men sum ikki eru rutinuuppgávur
- Hugtakið "Ongantíð" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum als ikki verða gjørdar av fyritøkuni

## Virksemi og arbeiðsfatan fyri verkligu læruni

| | Javnan | Sjáldan | Ongantíð |
|---|---|---|---|
| 1. at meta um upplýsingar og við støði í hesum fyrireika og fremja uppgávur skynsamt og úrslitagott, | | | |
| 2. samskifta munnliga og skrivliga, tað veri seg rætt, trúligt og fjølbroytt í mun til støðuna og samskiftismiðlarnar | | | |
| 3. nýta teldutøkni á skynsaman hátt | | | |
| 4. greiða úr hondum uppgávur sjálvstøðugt og ábyrgdarfult, at samstarva við onnur og taka samábyrgd í sambandi við dagliga sølu- og tænastuyrkið, | | | |
| 5. veita góða tænastu og at greiða úr hondum uppgávur samsvarandi mannagongdum og góðskukrøvum | | | |
| 6. greiða úr hondum uppgávur við virðing fyri umhvørvi, heilsu og trygd | | | |
| 7. avrika handilsligar uppgávur og sýna góðan handilsskap í verki innan rakstur og búskap | | | |
| 8. greiða úr hondum uppgávur innan sølu og tænastu, innanhýsis eins og uttanhýsis, út frá fatanini av starvsøki og ábyrgd | | | |

Námsskipan og Kunngerð fyri útbúgvingina

Umsóknin verður løgd fyri Yrkisnevndina, at taka støðu til.

Í sínum metingum um virkið kann fáa góðkenning sum lærupláss, leggur Yrkisnevndin dent á:

1. at yrkislærd fólk er á staðnum, við samsvarandi útbúgving og minst 3 ára arbeiðsroyndum, kann standa fyri upplæringini
2. at virkið javnan fremur allar tær týdningarmestu arbeiðsuppgávurnar, sum hoyra til viðkomandi yrkisgrein
3. at virkið hevur ta útgerð, sum eru neyðug fyri at kunna útinna arbeiðsuppgávurnar smb. pkt. 2.
4. at virkið lýkur treytirnar um arbeiðsumhvørvi, sum eru ásettar í lógum og reglum um gott og trygt arbeiðs - umhvørvi.

Góðkenning av virki ella fyritøku sum læruplláss verður latin fyri 5 ár í senn.

Viðgerðin av umsóknini um læruplássgóðkenning tekur støði í reglugerð um góðkenning av læruplássum, sum Yrkisnevndin samtykti 4. mai 2006. Partur av viðgerðini kann eisini vera ein sýnsmeting.
Lógargrundarlag: Løgtingslóg nr 94 um yrkisútbúgvingar frá 1998

Fyritøkan váttar við síni undirskrift, at givnu upplýsingarnar eru rættar og í samsvari við galdandi ásetingar á Yrkisútbúgvingarøkinum. Fyritøkan váttar samstundis, at tað er kunnugt við galdandi lóggávu á økinum og við innihaldið í viðkomandi útbúgvingarkunngerð, og at tað er ført fyri at nøkta ásettu krøvini við atliti at upplæringini innan viðkomandi yrkisgrein.

____________________________ _____________________________________

*Dagfesting* *Undirskrift virkisleiðarans*

Umsóknin skal sendast til: **yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo**

**Útbúgvingarkunngerðin, vísur á endamál og førleikamál:**

*Endamál*

**§ 1.** [1] Í útbúgvingini til sølufólk sbrt. hesi kunngerð fær lærlingurin gjøgnum skúlagongd og verkliga læru vitan og førleikar innan handilsliga arbeiðsøkið, tað veri seg í samskifti, sølu og tænastu, leitan eftir upplýsingum, vegleiðing, hagtølum, búskapi, ráðlegging, nýtslu av teldutólum o.ø.

*Stk. 2.* [1] Útbúgvingin til sølufólk endar við, at lærlingurin fær útbúgvingarskjal innan hetta yrkið.

*Førleikamál við útbúgvingarlok*

**§ 7.** Førleikarnir, ið lærlingurin skal hava ognað sær við útbúgvingarlok, eru, at hann skal duga:

1) at meta um upplýsingar og boð og við støði í hesum fyrireika og fremja uppgávur skynsamt og úrslitagott,
2) at samskifta munnliga og skrivliga, tað veri seg rætt, trúligt og fjølbroytt í mun til støðuna og samskiftismiðlarnar,
3) at nýta teldutøkni á skynsaman hátt,
4) at greiða úr hondum uppgávur sjálvstøðugt og ábyrgdarfult, at samstarva við onnur og taka samábyrgd í sambandi við dagliga sølu- og tænastuyrkið,
5) at veita góða tænastu og at greiða úr hondum uppgávur samsvarandi mannagongdum og góðskukrøvum,
6) at greiða úr hondum uppgávur við virðing fyri umhvørvi, heilsu og trygd,
7) at avrika handilsligar uppgávur og sýna góðan handilsskap í verki innan rakstur og búskap, og
8) at greiða úr hondum uppgávur innan sølu og tænastu, innanhýsis eins og uttanhýsis, út frá fatanini av starvsøki og ábyrgd

[1] Broytt við kunngerð nr. 19 frá 14. februar 2023

Les meira í kunngerðini her